# Skapandi kreftirnar eru gull verdar

Tað er mær sum borgarstjóri ein sonn frøi og ein stórur heiður vegna býráðið at ynskja øllum gestum hjartaliga vælkomnum til Klaksvíkar á Summar Festivalin, sum fyri fyrstu ferð nakrantíð fer av bakkastokki her í býnum í døgunum frá 12. til 15. august 2004.

Nøkur av teimum skapandi menniskjunum í nærumhvørvi okkara hava enn einaferð sett heimstað okkara á heimskortið á ein positivan og mennandi hátt, og tað eru vit teimum hjartaliga takksom fyri.

Um eitt so stórt og forkunnugt tiltak skal eydnast, mugu nógvir heilar og hendur arbeiða í felag og taka lógvatak, og tað hava tit, sum standa fyri hesum stóra tiltaki, enn einaferð víst vilja til – vit ynskja tykkum bestu eydnu.

## HUGFLOG OG VILJI

Sum nevnt er hetta tiltak fyrst og fremst ein liðuppgáva, men eg taki tó neyvan nakað frá hinum fyrireikarunum, sum allir gera eitt stórt arbeiði, um ein serlig heilsan fer til høvuðs stigtakaran og samskiparan, Steintór Rasmussen, ið so mangan áður hevur latið úr hondum listarligar perlur, sum eru blivnar fólkaogn, ikki bara her í lokalsamfelagnum men kring alt landið og enntá longur.

*Enn einaferð er tað eydnast tær – saman við øðrum góðum kreftum – at slóðað inn á áður ótráddar leiðir her í Klaksvík. Slíkt krevur stórt hugflog og ein óbendandi vilja. Vónandi verður unt tær framhaldandi orka og íblástur, so tað verður, sum tú sjálvur hevur yrkt um lívið:*

**"Lívið er mítt listarverk, eg máli jú hvønn dag. Um eg fylli 100 ár, ei liðugt verður tað".**

## EINA UPPLIVING RÍKARI

Summar Festivalurin í Klaksvík er ongantíð roynd-ur áður, og øll viðurskifti skulu tí roynast á fyrsta sinni. Eg veit, at fyrireikararnir gera sær stóran ómak, so vit øll skulu fáa nakrar góðar, hugnaligar og gevandi dagar, har tónleikur av ymiskum slag og uppruna fer at ljóða í býi okkara.

Vón og bøn mín er, at alt skal ganga væl, at veðrið verður til vildar, og at øll vitjandi skulu fara heimaftur, eina góða uppliving ríkari.

## VÆLKOMIN TIL KLAKSVÍKAR!!

*Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík*




HØVUÐSSTUÐUL:

NORÐOYA SPARIKASSI

STUÐLAR:

klaksvíkar kommuna

Shell

KJØLBRO HEILSØLA

FØROYA TELE

Föroya Bjór

ATLANTIC AIRWAYS

Sosialurin

Klaksvíkar Byggivirki· Klaksvíkar Timburhandil
Skipafelagið Føroyar · Hotel Norð



## SUMMAR FESTIVALUR 2004

**Hetta blað verður givið út í sambandi við Summar Festivalin 2004. Blaðið verður borið út saman við Sosialinum**

Útgevari: Sosialurin

Myndir: Jens Kristian Vang
Álvur Haraldsen
Sosialurin

Umbróting: Føroyaprent

Prent: De Bergske Blade

**WWW.SUMMARFESTIVALUR.FO**



klaksvíkar kommuna



*Klaksvíkar Býráð ynskir øllum eitt gott vikuskifti*

- ✓ Býurin, har mentanar- og vinnulívið ganga lið um lið
- ✓ Ein kraftarmiðdepil fyri norður-eystur Føroyar
- ✓ Har fiskivinnan hevur sítt besta umhvørvi
- ✓ Á gáttini til eina nýggja og spennandi tíð
- ✓ Eitt heilskapað lokalsamfelag
- ✓ Har tættleiki, trivnaður og tryggleiki eru lyklaorð
- ✓ Stórt frítíðarvirksemi og nógv frítíðartilboð
- ✓ Norðoya móðir
- ✓ "her hvar blíðskapurin aldri sveik"

Postboks 2 · Nólsoyar Pálsgøta 32 · FO-700 Klaksvík · Føroyar · Tel. +298 410000 · Fax +298 410001 · klaksvik@klaksvik.fo